# Tímdu ikki – kundu ikki

*Tá HB heldur spardi krútið til sunnudagin, meðan Sumba ikki megnaði at skapa nakað, mátti talan gerast um eina linliga uppgerð hóskvøldið, men sigurin hevði við sær, at HB nú er á odda í fyrstu deild*



*Saman við álopsfeløgum sínum vassaði Bárður í málmøguleikum, men úrtøkan var koritni so sum so*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

HB-Sumba 5-1 (3-1)

Orsakað av at HB sunnudagin skal royna seg í InterToto kappingini, varð dysturin móti Sumba framskundaður til hóskvøldið.

Helst vóru HB leikarar og viðhaldsfólk fegin um, at dysturin varð framskundaður heldur enn útsettur. Hetta gav nevnliga HB høvi til at koma ovast á stigatalvuna, heldur enn at skulu hava ein dyst til góðar, og so vera nakað niðarligari á listanum.

**Sum væntað**

Lat tað verða sagt beinanvegin, at hóast talan varð um ein sera linligan dyst, so var hetta kanska ikki meira enn væntandi.

Sumba hevur fleiri ferð í ár sýnt, at teir so at siga ikki megna at gera nakrar skreytir móti sterkastu liðunum í deildini, og so slettis ikki, tá talan er um útidystir.

Harumframt høvdu sumbingar eisini tvey leikbann at dragast við, so tað mundi vera so sum so við teirra vónum til dystin.

Hetta kundi kanska givið orsøk til at halda, at talan fór at gerast um eina sanna málveitslu hjá HB, men so varð kortini ikki. Einamest tí HB leikararnir tóktust hugsað meira um komandi uppgávuna í Toto cup, heldur enn tað, sum fyrifórst á vøllinum.

Trivaligi 5-1 sigurin kundi tó væl verið størri, tí serliga í seinna hálvleiki vassaðu HB'arnir í málmøguleikum, men væntandi neyvleikin gjørdi, at úrtøkan av hesum mundi verða niðanfyri 10%.

**Sumba droymdi í lítla løtu**

Tað var annars Sumba, sum fekk betri byrjanina, tí ikki vóru leikti meira enn 6 minuttir, so lá bólturin í HB málinum.

Málið var rættuliga væl spælt. Jan byrjaði sjálvur álopið, tá hann skifti úr høgru til vinstru, og eftir at Sasa hevði spælt bandaspæl framvið HB verjuleikara, legði hann bóltin inn aftur til Jan, sum stutt innanfyri brotsteigarmarkið langaði til.

Málið fekk kanska sumbingarnar at droyma um eina endurtøku av javnleikinum í fjør, ella kanska minniliga 3-1 sigrinum í '91, men so gjørdist kortini ikki.

Málið fekk HB at rakna eitt sindur við, og eftir lítlari løtu var støðan 3-1 til heimaliðið.

Fyrsta málið skeyt Bárður Mortansson, tá hann í besta Beckham stíli sendi fríspark úr 20 metra fjarstøðu upp um múrin og niður í nærmasta málhorn. Eigil Olsen í Sumbiarmálinum kundi lítið annað gera, enn bert hyggja at væl tikna frísparkinum.

Andrew av Fløtum skoraði til 2-1, tá hann tveitti seg og skeyt við høgra beini, eftir at sumbiarverjan ikki fekk ruddað bóltin burtur, og lítla løtu seinni hevði eingin sumbingur givið sær far um Hans á Lag, tá hesin kom fram við til hornaspark. Bólturin varð sendir innfyri, og nærum uttan at leypa upp, kundi Hans stúta bóltin úr fýra metra fjarstøðu.

**Spákaðu runt**

Eftir at teir soleiðis høvdu gjørt ein vørr, og at kalla tryggja sigurin, setti HB aftur leikferðina niður.

Ikki tí, nakrar málmøguleikar høvdu teir afturat, og serliga Pætur hevði fleiri góðar skotroyndir úr vinstra borði.

Hin vegin hendi ikki tað stóra. Hóast HB-leikararnir at kalla spákaðu runt á vøllinum, megnaði Sumba ongantíð at hótta HB málið aftur. Skipaðum spæli sást so at siga einki av frá teirra síðu, og at byggja álopsroyndirnar á langar bóltar móti monnum sum Hans og Símuni, er so ikki rætta uppskriftin, tá leikt verður móti HB.

**Brendu nógv**

Meginpartin av seinna hálvleiki var skilið hitt sama. HB spældi við hálvari ferð, men kortini høvdu teir fleiri møguleikar, uttan at hetta gav nakað úrslit.

Sumkbingarnir vórðu enn meira skerdir, tá Marlon Kjærbo fekk næsta gula kort sítt, tá hann royndi at vinna bóltin av Bárði, tá hesin var komin inn um sumbiarverjuna. Hevði HB havt nógvar møguleikar áðrenn hesa hending, varð heilt heilt galið, nú verjuskiparin hjá sumbingum var burturi. Tað kundi enntá verið enn verri hjá sumbingum, um dómarin sá, hvør leikari gav honum eitt skump, tá kortið skuldi gevast, ella um hann hevði revsað Spasoje harðari, tá hesin púra ómotiverað sparkaði Hans á Lag niður.

Ferð eftir ferð komu havnarmenninir í góðar skotstøður, men tað skuldi ganga eitt korter, frá tí at Marlon varð útvístur, til HB aftur fekk hol á. Hetta hendi, tá Pætur fekk bóltin úr vinstru og dróg framvið sumbiarverjuni, áðrenn hann hegnisliga sparkaði bóltin flatt við handara stólpan.

Løtu seinni slapp Bárður Mortansson, sum annars mundi vera størsti brennivargurin hóskvøldið, endiliga aftur framat. Pætur vann bóltin í vinstra borði, og sendi inn um verjuna, har Bárður hevði lætt við at senda bóltin í málið.

**Tankarnir á Tórsvølli**

Nógv annað er ikki at skriva um dystin hóskvøldið.

Munurin á liðunum var alt ov stórur, til at talan nakrantíð skuldi gerast um rætttuligan spenning, og hóast HB sum sagt spældi við á leið hálvari ferð, so høvdu teir møguleikar til at vinna rættuligan stórsigur.

Líkt var tó til, at tankarnir hjá álopsleikarunum leitaðu meira móti Tórsvølli, har HB sunnudagin skal royna seg móti ungaska Tatabanya, og hetta skulu sumbingarnir helst vera fegnir um.

**HB-Sumba 5-1 (3-1)**

0-1: Jan Poulsen 6.
1-1: Bárður Mortansson 10.
2-1: Andrew av Fløtum 14.
3-1: Hans á Lag 17.
4-1: Pætur Dahl 69.
5-1: Bárður Mortansson 72.

Dómari: Petur Reinert

**HB:**
Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Rúni Nolsøe, Rói Árting, Pætur Dahl – Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum, Jón Rói Jacobsen

**Sumba:**
Eigil Olsen – Spasoje Biberdzic, Marlon Kjærbo, Bergur Winther, Mortan úr Hørg – Jan Poulsen, Nikola Biberdzic, Hans Jacob Thomsen, Sasa Tomajek, Trygvi Nielsen – Rene Thomsen



*Hevði dómarin sæð, hvør skumpaði hann, tá Marlon varð rikin av vølli, kundi talan helst verið um fleiri reyð kort*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Vita einki um mótstøðuna

*HB formaðurin er spentur upp á dystin sunnudagin, men hann vil kortini ikki leggja nakað trýst á sínar egnu*

Jákup Mørk

HB formaðurin, Gunnar Mohr, er í góðum hýri í løtuni.

Unga HB liðið hevur higartil staðið seg sera væl í landskappingini, har teir nú eru á odda, og sunnudagin skulu leikararnir so royna seg í europeiskum høpi, tá ungverska liðið, Tatsabanya, kemur á vitjan.

**Vita einki**

Vit kenna einki sum helst til teir, eru orðini frá formanninum, tá vit spyrja hann, hvussu hann metir um egnar møguleikar í hesum dysti.

\- Einki er tó at ivast í, at teir duga at spæla fótbólt. Tað plaga tey flestu liðini at gera, heldur HB formaðurin fyri.

Hann vísur tó eisini á, at HB vanliga hevur fingið góð úrslit á heimavølli, meðan tað hinvegin hevur gingið heldur striltið, tá spælt verður úti í Europa.

**Einki trýst**

Sum nevnt omanfyri, so hevur HB í ár eitt sera ungt lið. Spurdur, um hann ikki heldur, at leikararnir eru dekan ov óryndir til altjóða uppgávur, svarar, Gunnar, at tað heldur hann als ikki.

\- Vit leggja einki trýst á leikarar okkara, men eg rokni við, at teir eru uppgávuna vaksnir, og eg ivist heldur ikki í, at vit fáa ein góðan dyst sunnudagin.

Higartil hevur liðið so væl og virðiliga livað upp til tær vónir, sum vit høvdu undan kappingini. Tá settu vit okkum sum mál, at vera millum 3-4 tey ovastu liðini, og sum støðan er í løtuni, ivist eg ikki í, at hetta fer at halda, sigur formaðurin, sum annars fegnast um, at so nógvir ungir leikarar veruliga hava tikið av møguleikanum, sum teir hava fingið í ár.

At enda lemaðurin afturat, at vónar, at veðurgudarnir nú endiliga fara at vera í parti við Tórsvølli.

Higartil hevur tað ongantíð riggað, og veðurútlitini eru ikki av teimum bestu, men vónandi er hetta broytt sunnudagin k. 15.00 sigur ein spentur Gunnar Mohr at enda.




**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Mentamáladeildin**

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið letur árliga stuðul til ymisk mentanarlig tiltøk og verkætlanir.**

**Við hesum verður lýst leyst at søkja um stuðul av niðanfyrinevndu stuðulsmøguleikum.**

## Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Undirvísingar- og Mentamálastýrið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður at nýta til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Við hesum verður lýst eftir umsóknum, sum lúka hesar treytir.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

## Studningur til myndlistafólk

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 40.000 játtaðar til studning til myndlistafólk, sum sýnt hava góðar gávur.

Tey, ið ætla sær ella eru farin uttanlands at útbúgva seg í málara-, myndhøggara- ella aðrari myndlist, eru vælkomin at søkja.

## Studningur til eftirútbúgving av listafólki

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 60.000 játtaðar til studning til eftirútbúgving av myndlistafólki.

Tey, ið ætla sær uttanlands í eftirútbúgvingarørindum, eru vælkomin at søkja.

Umsóknir eiga at verða skrivaðar á umsóknarblað, sum fæst við at venda sær til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 • 110 Tórshavn**
**Telefon. 355050 • Telefax 355055**
**e-postur.: umms@umms.fo**

Gjørt verður vart við, at umsóknarblaðið eisini er at finna á www.umms.fo

Umsóknirnar skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi innan **fríggjadagin 1. september 2000**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið á telefon 355050.

## Skopunar skúli

Søkt verður eftir lærara 17 1/2 t. um vikuna til skúlaárið 2000-2001.

Starvið er tíðaravmarkað. Verður lønt sambært avtalu millum lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið. Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 30. juni 2000.

**Skopunar skúlanevnd**
240 Skopun

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

## Samskipari í innkrevjingarmálum

Starv sum samskipari av allari innkrevjing av almennari skuld er leyst at seta skjótast til ber. Starvið er skipað undir eftirlitsdeildini í Stýrinum.

Verandi deildarstjóri í innkrevjingini er í farloyvi í løtuni, og kemur tann, ið verður settur í starvið, tí saman við øðrum persóni í stýrinum at taka sær av fleiri av uppgávunum sum deildarstjórin vanliga hevur tikið sær av.

**Arbeiðsuppgávur:**
Starvið er fjølbroytt. Tú kemur í samband við nógv fólk runt í landinum. Starvið er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Tú fært eisini møguleika at luttaka á skeiðum, sum kunnu menna teg til tær avbjóðingar, ið starvið ber í sær. Í løtuni verður arbeitt við at menna eina nýmótans og einfalda innkrevjingarskipan, og kemur tann, ið settur verður, at luttaka í hesum arbeiði.

Annars eru høvuðsuppgávurnar í stýrinum, sum viðkomandi saman við øðrum persóni kemur at taka sær av, m.a. hesar:

- at samskipa dagliga arbeiðið og eftirlitið við innkrevjingini við virksemið hjá Toll- og skattstovuni annars við beinleiðis ábyrgd yvir fyri eftirlitsdeildini í stýrinum.
- at skipa fyri samskiftinum við lógardeildina í stýrinum.
- at skipa fyri tí neyðuga samstarvinum við eftirlitið á Økisskrivstovunum.
- at skipa fyri vegleiðing og kunning til Økisskrivstovurnar.
- at skipa fyri, at virkisøkir, ið verða løgd til Økisskrivstovurnar, verða væl og virðiliga umsitin.
- at skipa fyri útbúgving av starvsfólki til innkrevjing.
- at koma við krøvum, sum kunnu betra um EDV-skipanina, sum innkrevjingin er við at menna.
- at hjálpa til við útpantingum í økjum, har hetta er neyðugt.
- at taka sær av øðrum uppgávum, sum eru álagdar Toll- og skattstovuni.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, men tó ongin treyt, at tann, ið settur verður, hevur kunnleika til edv og nakað av leiðsluroyndum. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir við innkrevjing av peningakrøvum úr øðrum starvi, góð samstarvsevni, evni at samskipa og seta í verk fyriskipanir.

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett við pantiheimild. Lønin er í 22. lønarflokki í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið ella annað avvarðandi yrkisfelag. Talan kann verða um eitt ískoyti til lønina í mun til støddina á uppgávunum og førleikan at loysa tær.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsóknir:**
Umsókn við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Stýrið
Postsmoga 2151
Traðargøta 39
FO 165 Argir

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2000. Um nakar ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kann viðkomandi seta seg í samband við Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, tlf. 352026, lokal 457.

**Um stovnin:**
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Í stýrinum eru fýra deildir: Eftirlitsdeildin, Lógardeildin, Menningardeildin og Umsitingardeildin. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

## Skipasmiðjan á Skála P/F

### søkir eftir leiðara til stáldeildina

**Starvið:**
Sum leiðari av stáldeildini á virkinum fær tú ábyrgdina av øllum fakteknisikum spurningum. Leiðarin verður partur av leiðsluni við tilvísing til tekniska leiðaran og stjóran. Leiðarin av stáldeildini skal saman við hinum deildarleiðarunum og leiðsluni annars, vera við til at menna virkið fakliga og tekniskt, styrkja verandi virksemi og troyta møguleikar fyri øktum virksemi. Leiðarin skal í samstarvi við onnur vera við til at samskipa arbeiði á skipasmiðjuni til gagns fyri bæði viðskiftafólk, starvsfólk og virkið sum heild.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at skipa og leiða dagliga arbeiði á stáldeildini.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði, fylgja hesum upp og saman við leiðsluni annars samskipa ymisku arbeiðini frá byrjan til enda.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera sjakformonnum, starvsfólki, viðskiftafólki o.ø. til hjálpar í faktekniskum spurningum.
- at vera við í tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er skipsverkfrøðingur, skipsbyggjari ella hevur líknandi útbúgving.
- hevur royndir innan stál- og skipasmíð.
- hevur leiðsluroyndir sum formaður ella líknandi og dugir at skipa og leiða arbeiði.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina sundur fakligar spurningar, viðgerða møguleikar saman við øðrum, taka avgerðir og seta hesar í verk.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum spennandi umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.
Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála P/F
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 21. juni 2000.

SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA

www.faroeyard.fo
skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.